Tíðindaskriv Apríl/Mai 2011

Hey tit øll!

So havi eg endiliga sett meg niður og fingið skriva tað síðsta nýggja úr Nakuru, Kenya.

Vit hava tað gott her, sjálvt um avbjóðingarnar eru nógvar. Vit vita at vit eru í vilja Harrans og at hann er við okkum í tí verki, sum vit gera. Vit síggja aftur og aftur hvussu Harrin leiðir okkum til fólk, sum veruliga hava brúk fyri hjálp. Fyrsta sunnudagin í apríl blivu 7 fólk frelst so at talið nú er komi uppá 30. Har blivu eisini 3 børn frelst. Tey komu fram og ynsktu at geva sítt lív til Jesus. Her var eisini ein kvinna, sum kom fram, sum hevði havt sjálvmorðstankar í longri tíð. Hon hevði sum so givið upp at liva, tí hon hevði einki. Onga familju, ongan mat, onga jørð og lítið og einki arbeiði. Vit gjørdu so av at hjálpa henni við eitt sindur av matvørum og tá hon greiddi frá at jørðin, sum mamma hennara hevði lovað henni, var tikin av beiggjanum, bóðu vit hana fara til leiðaran í bygdini og fáa hetta uppá pláss. Hetta hevur hon so fingið nú og vit hava so givið henni fræ at sáa og hava lova henni at byggja henni eini hús, sum hon kann kallað sítt egna. Eisini hava vit hjálpt henni við matvørum og hava keypt henni eina bíbliu eisini.

Á møtinum 10. apríl, var Bjørg av Rana og vitjaði. Hon var komin til Nakuru í øðrum ørindum, men hevði sett tíð av til at verða við okkum á einum møti. Hon hevði møguleikan at deila eitt orð á møtinum. Langa fríggjadag høvdu vit so vitjan av 3 ungum føroyingum heima her hjá okkum. Hans Karl Højgaard, sum hjálpir til í Norsk Luthersk Mission í Tanzania, hevði fingið vitjan av 2 vinmonnum og teir ynsktu at fara at vitja á Lake Nakuru National Park og tóku so tann møguleikan eisini at vitja okkum her. Vit høvdu eitt sera gott kvøld saman.

Leygardagin 30. apríl gjørdu vit so av at fara at deila klæðir út í Piave. Vit høvdu samla nakað av klæðum frá vinum og kenningum her í Nakuru, og vit gjørdu so av at koyra ígjøgnum bygdina og steðga við tey hús, har vit ikki høvdu verði áður. Hetta var sera áhugavert, tí hetta kom heilt óvæntað á tey og børnini vóru sera glað fyri at fáa “nýggj” klæðir.

Sunnudagin 1. mai var so 1 ár síðani vit byrjaðu at hava møti í Piave. Her gjørdu vit so eitt sindur meira burturúr. Stella hevði eina illustratión, har hon samanbar tað hon tosaði um við David og Goliat. Her spældu vit so eitt lítið drama og Stella gjørdi Coke Light – Mentos illustratión. Hendan dagin var Anne og Sakayo á møti við lítlu dóttrini, sum tey høvdu fingið. Hon bleiv vælsigna av Stellu og sjálvandi fekk hon navnið “Stella Wamboi”, til sera stóra gleði fyri Stellu. Hendan dagin fingu tey te og kaku.

Týsdagin, 10. mai, hevði Stella gjørt eina rimmar máltíð til ommurnar, sum hon samlar hvønn týsdag, men tá vit komu til húsini, har tær samlast, var hurðin stongd. Vit koyrdu so eitt sindur inn í bygdina, men sóu at eitt hvørt var áfatt. Einki fólk var at síggja, og tá vit ringdu til ein av okkara kontaktpersónum í bygdini, segði hann frá at har var jarðarferð. Vit gjørdu so av at venda og fara at vitja aðra familju í Piave. Tá vit komu har, var bert 8 ára gamla dóttirin heima. Hon ansaði tveimum 1½ ára gomlum

dreingjum. Kl. Var uml. 13 og hon segði at tey ikki høvdu etið síðani tíðliga um morgunin og tey vóru sera svong. So var bara at fara eftir fest máltíðini, sum vit høvdu í bilinum og so var at servera. Stella gav eina dreinginum, meðan lítla gentan gav hinum. Eisini høvdu vit breyð við og hetta gjørdu tey enda á. Vit gjørdu so av at fara at vitja dagin eftir fyri at keypa skúlabúnar til 2 av gentunum, so tær kundu fara í skúla. Hetta gjørdu vit so og gleðin var sera stór tá vit komu á gátt við hesum. Nú eru tær báðar í skúla, við nýggjum búna, nýggjari skúlatasku og nýggjum skóm.

Rama, sum arbeiðir saman við okkum hevði føðingardag 12. mai. Hann fylti 26 ár og hann hevði ongantíð áður hildið dagin. Vit gjørdu so av at gera eitt sindur meira burturúr hesum degnum, so at hann kundi fyri fyrstu ferð “halda føðingardag”. Vit høvdu keypt honum gávur og eina kaku, har tað stóð “happy birthday Rama”. Hann var so glaður fyri hetta. Eisini grillaðu vit høsnarunga og tað er ein festmáltíð fyri kenyanar.

Mánadagin 15. mai vóru vit so aftur í Piave, har vit høvdu avtalað at møtast við 2 eldri fólkum. Tann eina var kvinnan, sum er nevnd omanfyri, sum fekk matvørur og fræ og bíbliu. Hin var Bernard, sum vit hava skrivað um fyrr. Hann hevur ein sponsor heima í Føroyum, sum setur pengar inn hvønn mána til at hjálpa Bernard. Vit geva honum so matvørur 14. hvønn dag og tað honum hevur tørv á. Hann hevur verðið sjúkur í seinastuni, so hann var á sjúkrahúsi við Rama eina dagin og fekk heilivág til tað. Hendan dagin vit møttu honum var hann sera illa fyri. Hann hevði tungan andadrátt, var kaldur og sera illa fyri. Stella gjørdi so av at gera honum ein lítlan døgurðabita á staðnum. Vit høvdu pylsur og annað gott við, so hann ynskti at fáa nakrar pylsur og eitt sindur av grønum. Vit gjørdu so av at fara at keypa honum eina song, tí hann liggur á bóli nú og har er sera fuktugt. Eisini fara vit at royna at keypa honum eitt stykki av jørð har hann kann byggja sítt egna hús. Biðið fyri hesum.

Kezia hevur tað gott í skúlanum og hevur stóra framgongd. Í síðstu viku fekk hon prógv fyri besta avrik í skúlanum hetta skúlaárið. Eisini fekk hon heiðurin “Junior sportswoman of the week” hesa vikuna. Hon er sera dugnalig í svimjing og í øðrum ítrótti. Minnist til hana í bønum tykkara eisini.

Vit ynskja at takka tykkum so hjartaliga fyri fíggjarligan og bønarstuðul. Harrin signi tykkum.

Okkara konto nr. er: 426.093.9 í BankNordik.

God bless.

Stella, Petur og Kezia